SKJAL 4

*Skjal til løgtingsmál nr. 19/1983:*
**Tiltøk at minka um tubbaksnýtsluna**

# Álit frá nevndini sum landsstýrið hevur sett at kanna og gera uppskot um tubbakslóggávu

Longu í august 1978 hevur felagið *Heilbrigdið* í skrivi til Løgtingið gjørt vart við tørvin á eini tubbakslóggávu.

Í skrivi frá Barnaársnevndini til Landsstýrið, dagfest 10. januar 1980, hevur Barnaársnevndin við m.a. tilmæli frá felagnum *Heilbrigdi* samtykt at senda Landsstýrinum eina áheitan um at kanna tørvin á tubbakslóggávu í Føroyum.

Uppskot frá Landsstýrinum um setan av tubbaksnevnd varð samtykt í Løgtinginum tann 28. apríl 1980.

Landsstýrið hevur sambært hesi løgtingssamtykt við skrivi tann 3. december 1980 sett eina trímannanevnd, har ein limur er valdur eftir tilmæli frá felagnum *Heilbrigdi*, annar eftir tilmæli frá Læknafelag Føroya og triði limurin er tilnevndur av Landsstýrinum, og skal hesin vera løgfrøðingur.

Henda nevndin sær soleiðis út:

*Turið Debes Hentze*, løgfrøðingur, tilnevnd av Landsstýrinum, og formaður í nevndini.

*Nanna Skála*, fysioterapeutur, tilnevnd av felagnum Heilbrigdi.

*Jógvan Róin*, yvirlækni, tilnevndur av Læknafelag Føroya.

Av tí at nevndin ikki varð sett fyrr enn 3. desember 1980, er tað greitt, at freistin fyri arbeiðnum hjá hesi nevnd, sum upprunaliga varð sett í seinasta lagi august mánaði 1980, ikki kundi haldast.

Løgtingssamtyktin fyriskrivar nevndini at koma við uppskoti um tubbakslóggávu fyri Føroyar.

Tá eingin slík lóggáva finst á hesum øki frammanundan, hava vit í nevndini sæð tað sum okkara uppgávu at leggja lógaruppskot fram, sum í síni heild hevur til endamáls at minka um tey heilsubrek, sum nýtslan av tubbaki førir við sær.

## Er slík lóggáva neyðug?

Fleiri og fleiri lond - av Norðurlondum øll uttan Danmark - hava øll hesi seinastu 10 árini framt lóggávutiltøk fyri at minka um tubbaksnýtsluna, serliga hjá teimum ungu.

WHO setti í 1974 ein bólk av serkønum í eina nevnd, sum skuldi vera ráðgevandi fyri limalondini í spurningum um, hvussu best kundi stríðast ímóti tubbaksvandanum.

Hesin bólkur er komin við fleiri frágreiðingum, seinast í 1979 (Controlling the smoking epedemic - report of the WHO expert commity on smoking control - technical report seria 636).

## Royking og lungacancer

Tað finnast nú ógvuliga nógvar kanningar frá ymiskum londum, bæði aftur- og frameftirkomandi, sum vísa sambandið millum royking og lungacancer.

Av hesum kanningum sæst, at vandin fyri at fáa lungacancer økist.

I: eftir talinum av cigarettum tú roykir.
II: eftir hvussu tíðliga tú byrjar at roykja.
Tað eru fimm ferðir fleiri, sum fáa lungacancer av teimum sum byrja at roykja 15 ára gomul, enn av teimum sum byrja at roykja 25 ára gomul.
III: jú meira tubbaksroyk tú andar í teg.

## Royking og aðrar sjúkur

Royking hevur eisini týdning fyri framkomu av øðrum sjúkum:

I: sjúkum í hjarta- og blóðrensli.
II: kroniskum lungasjúkum.
III: magasár.
IV: krabbasjúkum í sodningarlag og blóðru.
V: fyri barnið í móðurlívi.
Kvinnur, ið roykja, missa oftari fostrið enn tær, sum ikki roykja og fáa smærri og skirvisligari børn.

## Royking og umhvørvi

Í tubbaksroykinum eru fleiri krabbakveikjandi evni, sum t.d. tjøruevni, nikotin, koliltan, sum bæði tann aktivi og tann passivi roykjarin fær í seg. Tí mugu vit gera nakað fyri at fáa roykfrítt umhvørvi og fyri at minka um tubbaksnýtsluna har børn, ungdómur og barnakomur ferðast.

## Hjálpir tubbakslóggáva?

Í fleiri londum í Europa minkar tubbaksroykingin millum menn, meðan hon økist hjá kvinnum.

Samstundis hevur tað víst seg, at lungacancer-tilburðirnir hjá kvinnum í teimum somu londunum veksur, meðan hon minkar hjá yngri monnum.

Bæði í Svøríki og Noregi, har tubbakslóggáva varð sett í gildi, longu fyrst í 70'unum, hevur tað víst seg, at tað er eitt munandi fall í roykingini millum tey ungu, og serliga er tað hjá dreingjum. Ein kanning í Svøríki í grundskúlanum, ið vísti, at 21% av dreingjunum royktu meðan 34% av gentunum. Í Noregi sæst eitt fall í royking millum 14 ára gamlar dreingir frá 57 til 46%, meðan samstundis hevur verið ein vøkstur hjá 14 ára gomlum gentum frá 36 til 51%.

Í Danmark sær tað út til, at 40% av teimum eldru næmingunum í grundskúlanum roykja.

## Støðan í Føroyum

Frá 1960 til 1973 sóu vit frá 1 til 4 tilburðar av lungakrabba um árið, meðan vit síðani 1974 hava havt vaksandi tøl. Soleiðis, at vit nú síggja millum 10 og 14 tilburðir árliga.

Samstundis økist cigarettnýtslan í stórum.

Í 1975 innfluttu vit 39.888 kg av cigarettum til eitt virði av 1,9 mill. kr.. Í 1978 innfluttu vit 62.295 kg fyri 3,3 mill. kr.. Hetta vísir ein stóran vøkstur í tubbaksnýtsluni og samstundis fleiri lungakrabbatilburðir og helst eisini aðrar skaðiligar sjúkur, sum standast av tubbaki.

Tí er ein lóggáva neyðug fyri at minka um tubbaksnýtsluna og tey heilsubrek, sum standast av tubbaksroyki.

**Tubbakslóggáva í grannalondunum:**

Áðrenn nærri verður farið inn á tey ymisku tiltøkini ein kundi hugsað sær at gjørt í Føroyum, skal í stuttum greiðast frá hvat tey nærmastu londini uttan um okkum hava gjørt av lóggávuarbeiði fyri at minka um tubbaksnýtsluna.

**Danmark:**
Har er so gott sum einki gjørt á hesum øki uttan tað, at innanríkisministeriið og tubbaksídnaðurin sjálvboðin hava gjørt sáttmálar um avmarking av tubbakslýsingum.

Annars var longu tann 5. februar 1971 uppskot frammi um tubbakslóggávu og úrslitið varð, at ein fólkatingsnevnd við 17 limum varð sett fyri at kanna málið

**Noregi:**
Galdandi lóg er frá 9. mars 1973 »Lov om restriktive tiltak ved omsetning av tobaksvarer m.v.«, við seinni broytingum. Henda lógin avmarkar søluna av tubbaksvørum, setir bann fyri lýsingum av tubbaksvørum eins og hon ásetir, at tubbaksvøran ikki má verða seld uttan at vera merkt á ein nærri ávísan hátt.

**Svøríki:**
hevur eina tubbakslóggávu sum kom í gildi 1. januar 1977, og sum ógvuliga nágreiniliga ásetir eitt hámark fyri tjøru-, nikotin- og koliltuinnihaldi, sum kann vera í tubbaki, eins og lógin sigur, at innihalds- og ávaringartekstur skal vera á øllum pakkum við tubbaksvørum.

**Finnland:**
1. mars 1977 kom í gildi ógvuliga rúgvismikil lóg um »Åtgärder för inskränkande av tobaksrøknimg«.

Henda lóg er tann mest umfatandi og viðger bæði spurningin um, hvussu sterkar cigarettirnar kunnu vera, og hvussu sølan eigur at fara fram, setur bann fyri lýsingum, eins og reglur eru ásettar fyri, hvar, ið roykjast kann.

**Ísland:**
Tubbakslóg »Lög um ráðstafanir til að draga úr tóbaksreykingum«, kom í gildi 1. juni 1977 og setur bann fyri tubbaksreklamu, og sagt verður eisini, hvar loyvt verður at roykja.

**Ongland:**
Tað finst ein lóg frá 1965 sum bannar cigarettlýsingum í sjónvarpi, men annars er eingin lóggáva um bann ímóti lýsingum, og tað er heldur eingin lóg fyri merking av tubbaksvørum, men teir ensku tubbaksframleiðararnir hava gjørt avtalur við socialmálaráðið um sjálvbodnir at merkja pakkarnar við ávaringartekstum.

---

Nevndin hevur tosað um tiltøk, ið hon heldur áttu at verið framd fyri at minka mest møguligt um tubbaksnýtsluna, og er komin til ta niðurstøðu, at ikki alt, sum tosað hevur verið um, kann ella eigur at verða havt við í lóggávuuppskotinum, og verður her serliga hugsað um tey lógartiltøk, sum áttu at verið framd um tubbaksupplýsing í skúlum, útvarpi og sjónvarpi.

Annars metir nevndin, at flestu av teimum tiltøkum, sum neyðug eru at fremja, um munandi minking skal vera í tubbaksnýtsluni, eru við í lógaruppskotinum.

Ásannast má, at um minkast skal um tubbaksnýtsluna, er ikki nóg mikið við reglum um roykibann. Reglur mugu eisini vera, sum áseta hvussu vøran skal vera, sum seljast skal:

a) eitt hámark eigur at vera fyri eitrandi evnum í tubbakinum eins og
b) ikki eigur at verða loyvt at selja, uttan at innihalds- og ávaringartekstur er á øllum pakkum við tubbaksvørum.

Omanfyri nevndu tiltøk eru av størsta týdningi, um ynski eru um eina broyting í tubbaksnýtsluni. Hetta samsvarar eisinivið tað, sum gjørt verður í grannalondum okkara, og eru vit tí ikki slóðbrótarar, um vit samtykkja eina tubbakslóggávu av hesum slag.

Av tí at vit í Føroyum ikki sjálv framleiða tubbaksvørur, ger ein lóg, sum er galdandi fyri framleiðarar ikki nógv gagn. Men vit kunnu gera lóg sum ásetir, undir hvørjum treytum tubbaksvørur kunnu seljast her á landi.

Tá hesar reglur eru gjørdar, boðar landsstýrið ella landsstýrisins vegna, tubbaksnevndin, einum ella fleiri av tubbaksframleiðarunum í útlandinum frá, hvussu vørurnar til Føroya skulu vera.

Vitandi um, at vit í Føroyum sjálvandi ikki kunnu lóggeva fyri framleiðaran í útlandinum, hevur nevndin spurt seg fyri m.a. í Svøríki um, hvussu liggur fyri at fáa tubbaksvørur framleiddar og innpakkaðar eftir áheitan úr Føroyum.

Svarið hevur verið so positivt, at eingin grund er at halda, at tubbakslóggávan, orsakað av hesum, ikki kann verða framd í Føroyum.

Spurningurin er síðani, hvussu fram skal farast:

1) Skal landið ella onkur annar hava einkarrætt til innflutning av tubbaksvørum, ella
2) kann tann einkulta sølubúðin ella heilsølan framvegis innflyta beinleiðis,

í báðum førum sjálvandi bert frá framleiðarum, sum fylgja treytum landsstýrisins.

Hetta er ein politiskur spurningur, men nevndin metir kortini, at hetta mál verður best greitt við at landsstýrið, sum við millumbilum heitir á teir ávísu framleiðararnar, eisini hevur einkarrætt til innflutningin.

Kanska er okkurt sum talar ímóti at geva landinum einkarrætt, men nógv er sum talar fyri hesum, sum tó ikki skal komast nærri inná. Nevnast skal bert, at landsstýrið á henda hátt fær eina stýring av søluni, og t.d. kann nokta søluloyvi til tær sølubúðir, sum liggja ov nær skúlum o.t.

Fyri ta einkultu sølubúðina man munurin ikki vera stórur á, um hon skal keypa vørurnar í útlandinum, ella um hon kann fáa tær frá einkarsøluni.

At enda verður sett fram uppskot um setan av fastari nevnd, hvørs arbeiðsøki nærri verður ásett av landsstýrinum.

Úrslitið av nevndararbeiðinum er niðanfyri standandi lógaruppskot við viðheftum viðmerkingum.

Tórshavn, tann 3. juni 1981

*Turið Debes Hentze*, (sign.) *Nanna Skála*, (sign.)

*Jógvan Róin*, (sign.)

(viðløgd er ein síða við ymiskum ávaringarmerkjum úr Noregi)

**Vedlegg A**

1
Dagleg sigarettrøyking er helsefarleg
**RØYKING OG KREFT**
Røykjarar har større risiko for kreft, m.a. i lunger, strupe og urinblære
HELSEDIREKTORATET

2
Daglig sigarettrøyking er helsefarlig
**HJERTE-KARSYKDOMMER**
Røykere har økt risiko for hjerte-infarkt og andre karsykdommer
HELSEDIREKTORATET

3
Daglig sigarettrøyking er helsefarlig
**RØYKING OG EMFYSEM**
Røyking er en viktig årsak til lungeemfysem, en sykdom med sprengte lungeblærer og nedsatt pusteevne
HELSEDIREKTORATET

4
Dagleg sigarettrøyking er helsefarleg
**Røyking under svangerskapet kan skade barnet**
HELSEDIREKTORATET

5
Daglig sigarettrøyking er helsefarlig
**RØYKING OG SPEDBARN**
Spedbarn som utsettes for tobakksrøyk, får oftere lungebetennelse og bronkitt
HELSEDIREKTORATET

6
Daglig sigarettrøyking er helsefarlig
**Jo mer du røyker, jo større helsefare**
HELSEDIREKTORATET

7
Daglig sigarettrøyking er helsefarlig
**RØYKHOSTE OM MORGENEN**
er ofte tegn på helseskade. Slutter du å røyke, kan hosten bli borte
HELSEDIREKTORATET

8
Dagleg sigarettrøyking er helsefarleg
**DU SOM HAR RØYKT LENGE**
Sluttar du å røykje, minkar risikoen for alvorlege sjukdommar
HELSEDIREKTORATET

9
Daglig sigarettrøyking er helsefarlig
Røykere får oftere magesår enn ikke-røykere. Såret leges raskere hvis en slutter å røyke
HELSEDIREKTORATET

10
Daglig sigarettrøyking er helsefarlig
**TIL DEG SOM ER UNG**
Jo tidligere du begynner å røyke, jo større er risikoen for å bli syk
HELSEDIREKTORATET

11
Dagleg sigarettrøyking er helsefarleg
**Den som sluttar å røykje, kjem raskt i betre form**
HELSEDIREKTORATET

12
Daglig sigarettrøyking er helsefarlig
**RØYKING SKADER LUNGENE**
Det starter med røykhoste og kan ende med lungekreft eller annen alvorlig sykdom
HELSEDIREKTORATET

Vedlegg B

**til forskrifter om merking av sigarettpakker, røyketobakkpakker og sigarettpapirpakker.**

Innholdsdeklarasjon på sigarettpakke.

Mønster for oppsett (tallene er fritt valgte eksempler)

| Røyken fra en sigarett inneholder | |
|---|---|
| Tjære | ca 19 mg |
| Nikotin | ca 1,6 mg |
| Karbonmonoksyd (kullos) | ca 20 mg |

Tellestrykk A.s 4.83. 2000